# TILTØK

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og tá verður eisini møti, har Bárður Ljósheim talar, kl. 21 Bønar- og lovsongsløta fyri ung í aldrinum 13-19 ár.
Mánakvøldið kl. 19 Ungdómstiltak, sum er ætlað ungdómi (5.-10. flokk).
www.hebron.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evnið: Kraftin í uppreisnini, kl. 11 Gudstænasta, Bergur Jensen.

**Ebenezer**
Fríggjadagin kl. 20 Teen-Night
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti har Awana og barnasangkórini luttaka. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í kvøld kl. 20 After Eight.
Leygardagin kl. 20 Bøn í býnum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikumorgunin kl. 7 Bønarmøti.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli kl. 18 Møti v/ Sigurd Sørensen.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15 til 18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. »Ver her og vak við mær. Vak og bið!«

**Meinigheitshúsið**
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Leygardagin kl. 16-18.30 Foreldur og børn.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Reimund Langgaard

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin einki møti ella sunnudagsskúli, vegna luttøku í vígslu av samkomuhølum hjá Frelsunarherinum í Vági.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Tummas Jacobsen, evnið: »Hevur tú eld?«.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Rúni Rasmussen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC. Evnið er »Vatndópurin« v/ Ásu Olsen, kl. 16.00 Samkomufundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Fríggjakvøldið kl. 20-22 JC-Teens.
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. Biðið verður fyir sjúkum. www.rhema.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin 28. Møti v/ Regin Olsen.

**Nólsoyar Missiónshús**
Missiónsvikan byrjar fríggjakvøldið kl. 20, Gunnar Reynslág talar, Gittit syngur.
Leygardagin kl. 17 Útimøti í Geilini, kl. 20 Møti í missiónshúsinum v/ Meinigheitskórinum úr Havn.

**Miðvágs Missiónshús**
Einki møti sunnudagin vegna konfirmatión. Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Saron, Vestmanna**
Leygardagin kl. 15 Bíbliuseminar við David Bech. Evnið: »Heilagi Andin«.
Sunnudagin kl. 18 Kvøldmøti við Eiler Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20 Opið hús fyri ung.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sjómanskvinnuringurin hevur pakkafest mánakvøldið kl. 19.30. Vit faá vitjan av ringinum á Strondum og Selatrað. Teir fýra úr Havn syngja og tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Sunnudagin kl. 17 Møti við Maibritt og Kaj Otto Frederiksberg. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Tummas Jacobsen.
Mánadagin kl. 17.30 Tim 5 og kl. 20 Ungdómsmøti.

**Avhaldshúsið í Haldórsvík**
Leygarkvøldið kl. 20 Evangel. møti har Palli Højgaard talar.
Sunnukvøldið kl. 20 Nógvur sangur og vitnisburður. Herman og Gigga syngja. Luttøka Tórmund og fleiri.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið verður ungdómsmøti kl. 21.
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli og kl. 18 Møti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 18 Sang og vitnimøti, kl. 21 Ungdómsmøti v/ Signar á Reynatrøð.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Bodil og Pól Jóhannes Simonsen.
Páskastevna byrjar Skírisdag í Skálanum.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria fríggjakvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**KFUM & K í Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti. Ungdómsmøti kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti við vitjan úr Noregi.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti, innsavnan.
Mánadagin kl. 17 Barnaarbeiðið 1.-7. fl., kl. 19 ungdómsarbeiði frá 7. fl.
Hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 er einki møti.
Vælkomin í Betania.

**Keldan í Skálavík**
Leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 19 hevur Svenning av Lofti møti undir heitinum »Jesus okkara einasta vón«. Fríur vitnisburður. Sangluttøka: M. C. Restorff úr Havn og sangfólk úr Sandoynni. Barnamøti verða báðar dagarnar kl. 16.

**Salem, Tvøroyri**
Møti verður í kvøld kl. 20, kl. 22 Ungdómsmøti við Poul Færø og Jógvan Páll Sevdal. Sangkórið úr Filadelfia í Gøtu luttekur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Sigrid Ludvig og Johan Thomasen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Fríggjakvøldið kl. 20 Vígsla av nýggja samkomuhúsinum, kommandør B. Donald Ødegård talar.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við soldátavígslu, kommandør B. Donald Ødegård talar, kl. 18 Evangel. møti við barnavælsignilsi, Eyðun Christiansen talar.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Bygdarhúsið í Lopra**
Í kvøld og leygarkvøldið kl. 20 Møti, Osvald Kjærbo talar, Svein Petersen luttekur við sangi og vitnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 22. mars***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Myndaveving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
***Týsdagur 23. mars***
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen.
kl. 14.30 Ein tími í føroyskum, Bergljót av Skarði
***Mikudagur 24. mars***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur eftir gøtuni niðan á Nabb og oman gjøgnum viðalundina
**kl. 17-21 Opið hús**
***Hósdagur 25. mars***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 26. mars***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
**Leygardagin 27. mars** fara vit til Havnar til Boccia kapping. Vit fara við bussi úr Tilhaldinum kl. 9.05 og úr Skopun við Teistanum kl. 9.30. Vit fara á Sjómansheimið at eta døgurða og síðani í Gundadalshøllina til kappingina ið byrjar kl. 12. Kappingin er liðug uml. kl. 15. Túrurin kostar 120 kr. og tað er neyðugt at tekna seg til túrin í Tilhaldinum ella á tlf. 361990, í seinasta lagi mikudagin 24. mars.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*

***Hósdagin 26. mars***
Opið hús
***Fríggjadagin 27. mars***
Stongt.

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks. Ver hjartaliga vælkomin í Fløvan.*

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**ACA**
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

## GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 27. mars hava Hanna og Eiler Thomsen, Vágur, gullbrúdleyp. Tey, ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið eru vælkomin inn á gólvið hjá dóttrini Solgerd millum kl. 10-14.



NORÐURLANDAHÚSIÐ TILTØK MARS 2004
SKRÁIN VIKA 10–11
Leygardagur 27. mars
Kl. 19.30 Konsert við Lenu Andersen
Útgávukonsert í samband við at nýggja fløgan "Can't Erase It" verður útgivin. Atgongumerki á kr. 150.- eru at fáa í Norðurlandahúsinum og Kunningarstovuni í Havn
Norðurlandahúsið er opið:
Gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00
Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00 og sunnudagar kl. 14.00-17.00
NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo




## FILMSTEIGURIN

# Hidalgo

Buffalo Bill sigur í sirkusi sínum, at hann er besti reiðmaður í heiminum, men sjálvur heldr Frank T. Hopkins, at hann bert er ein drukkin cowboy'ari, sum er ávegis deyðanum á sama hátt, sum gamla »Wild West« er tað. Men saman við hesti sínum, Hidalgo, fær hann kortini ein nýggjan møguleika.

Arabiski sheik Riyadh vil nevnliga ikki finna seg í, at ein villur hestur – ein mustang – skal vera betri enn hansara egnu arabarahestar, og tí bjóðar hann Frank og Hidalgo av í einari 4.500 kilometra langari kappríðing í oyðimørkini. Og skjótt – og uttan at hann veruliga hevði varnast tað - er Frank nú ávegis einum nýggjum og fremmandum heimi.

Her ein hann ein einsamallur vantrúgvin maður millum muslimsku beduinarnar, hvørs søgu og siðir hann ikki kennir. Her ríður hann á einum lítlum flekkutum mustang millum flottu arabisku hestarnar. Men undir náðisleysu sólini í eirindaleysu kappingini vísa Frank og Hidalgo, hvørjum teir eru gjørdir úr. Eisini hóast dirty tricks eru ein partur av spælinum.

Fyri fyrstu ferð síðani Ringanna Harra hevur Viggo Mortensen ein stóran leiklut, og ímóti sær hevur hann livandi filmlegenduna, Omar Sharif.





# Scooby Doo

Tann heimskendi Granddanois, Scooby Doo og restin av gátuføra bandanum – Stubbe, Jan, Vera og Susan – eru nú aftur saman, og aftur skulu tey loysa bæði gátur og spøkilsissøgur. Gátuføri bandin er um at koma sær í ringt ljós, tí ein maskuklæddur ránsmaður klárar ótarnaður at skapa rok í búnum Hann hevur skapt sær eina monsturmaskinu, og við hesum kann hann skapa hópin av gomlum og kendum spøkilsum. Og so er tað upp til Scooby Doo og hini at finna útav, hvat veruliga gongur fyri seg.




Frumsýning
Fríggjadagin 26.03. kl. $20^{30}$ Fríggjadagin 26.03. kl. $23^{30}$
Leygardagin 27.03. kl. $20^{30}$ Leygardagin 27.03. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 28.03. kl. $20^{00}$ Sunnudagin 28.03. kl. $22^{45}$

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Heimsfrumsýning
Fríggjadagin 26.03. kl. $16^{30}$ Fríggjadagin 26.03. kl. $18^{30}$
Leygardagin 27.03. kl. $16^{30}$ Leygardagin 27.03. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 28.03. kl. $16^{00}$ Sunnudagin 28.03. kl. $18^{00}$



Fríggjadagin 26.03. kl. $23^{15}$ Leygardagin 27.03. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 28.03. kl. $18^{15}$



Fríggjadagin 26.03. kl. $20^{45}$ Leygardagin 27.03. kl. $20^{45}$
Sunnudagin 28.03. kl. $20^{30}$



Fríggjadagin 26.03. kl. $18^{15}$ Leygardagin 27.03. kl. $18^{15}$
Sunnudagin 28.03. kl. $23^{00}$



Fríggjadagin 26.03. kl. $16^{00}$ Leygardagin 27.03. kl. $16^{00}$
Sunnudagin 28.03. kl. $16^{15}$